## Respektleyst!



Forkvinnan í næmingaráðnum í Hoydølum, Beinta Beinisdóttir, var sera vónbrotin soleiðis sum leygarkvøldið tók seg út.

– Hetta var respektleyst og vit eru sera vónbrotin, staðfesti hon og vísti á, at um tað var soleiðis at ein veitsla skuldi haldast, so tímdu tey í ráðnum ikki at vera við at fyrireika slíkt meira.

Beinta Beinisdóttir ynskti tó at takka øllum teimum, sum høvdu hjálpt til við uppruddingararbeiðinum og eisini teimum mongu, sum høvdu uppført seg sum vanlig fólk á veitsluni.

**-rwd**

## Ann Krista og Hugin Miss og Mr. Hoydalar



Av tí, at næmingaveitslan endaði so brádliga í Hoydølum leygarkvøldið, so komu tey ongantíð so langt sum at kjósa Miss og Mister Hoydalar.

Hetta er eitt árligt afturvendandi tiltak, har næmingar sleppa at velja, hvørji tey halda hava henda heiður uppibornan.

Mánamorgunin eftir álvarsama fundin um rokilsi leygarnáttina, varð hetta so kunngjørt. Miss Hoydalar 2006 gjørdist Ann Krista í Dali og Mister Hoydalar gjørdist Hugin Reistrup.

**-rwd**

Apuveitsla í Hoydølum:

# Tømdu pulvursløkkjara um skúlan

**Næmingaveitslan, sum var í Hoydølum leygarkvøldið, endaði sum ein reguler apuveitsla. Fólk hoppaðu uppi á borðinum, tveittu við mati og endaðu við at tøma ein pulvursløkkjara um alla miðhæddina**

VEITSLA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Sjáldan áður hava so nógvir næmingar verið til ein kunningarfund, sum tað var um tíggjutíðina í morgun, tá apuveitslan leygarkvøldið var á breddanum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Í morgun hevði Mads Winther, rektari á Studentaskúlanum í Hoydølum, saman við næmingaráð skúlans kallað allar næmingarnar inn til fund. Orsøkin var veitslan, sum var á skúlanum leygarkvøldið.

Nógv var gjørt burtur úr fyri at fáa hesa veitslu so góða sum gjørligt. Samkomuhøllin var pyntað, tónleikur skuldi framførast, ein filmur var gjørdur til kvøldið og skuldi eisini vísast. Men hetta fór við so nógvum í vaski, tí nakrir næmingar ikki dugdu at uppføra seg sum vanlig fólk.

### Tveittu við mati

Tað sum upprunaliga skuldi vera ein festlig og stuttlig veitsla, endaði sum ein reguler apuveitsla. Nakrir næmingar, sum ikki dugdu sær hógv, hoppaðu uppi á borðunum, kleyraðu í matinum og tveittu hann eftir hvørjum øðrum. Samkomuhøllin sá snøgt sagt ræðulig út, og líktist hvørki einum ella øðrum hesa løtuna.

Men tað var ikki einans í auluni, at hesir ólátaðu næmingar gjørdu um seg. Undir borðhaldinum fingu teir fleiri at vita, at nú máttu teir taka seg saman og uppføra seg sum fólk, men hetta rein ikki við. Heldur hildu teir fram við garterilsinum á miðhædd skúlans, har teir tóku ein pulvursløkkjara og tømdu hann út um alla hæddina.

### Næmingaráðið tók ábyrgd

Tá hetta hendi handlaði næmingaráðið beinanvegin. Tey tóku ábyrgd og endaðu veitsluna umgangandi. Klokkan var tá farin nakað av midnátt. Uttan iva ætlaðu mong sær at halda longri á enn hetta, men tá vórðu øll sum ein tveitt úr skúlanum, tí nú var ovboðið.

Síðani var upptakið eftir – og tað var ikki hissini upptak. Pulvur fylti alla miðhæddina, og kom allan vegin niðurundir í forhøllina eisini. Hetta kravdi sjálvandi, at fleiri fólk máttu koma at rudda og vaska.

Aulan líktist einum køsti, og ótangarnir høvdu veruliga gjørt sær ómak við at órudda og dálka mest møguligt, so borðini máttu vaskast á báðum síðum.

Í morgun, tá Sosialurin vitjaði uppi í Hoydølum líktist skúlin sær sjálvum. Har var reint og ruddiligt og lítið sást til, at skúlin dagin fyri hevði verið fullkomiliga endavendur. Tað einasta, sum sást á skúlanum var, at tvær stovur vóru stongdar, sum ein beinleiðis avleiðing av hurlivasanum leygarkvøldið.



*Pulvursløkkjarin var tømdur og pulvur var um alla miðhæddina*

# Ongin tveittur heim

**Mads Winther, rektari, segði á fundinum í morgun, at ongin verður tveittur úr skúlanum eftir leygarkvøldið. Men hann staðfesti, at eitt álit var brotið og at fyribils verða ongar veitslur hildnar aftur á skúlanum framyvir**

VEITSLA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



– Ja, nú sita tit her aftur. Hesaferð kanska meiri friðarlig, enn tit sótu seinast. Soleiðis byrjaði Mads Winther, rektari, fundin í auluni á Studentaskúlanum í Hoydølum um tíggjutíðina í morgun.

Seinast somu næmingar vóru savnaðir í høllini, var alt eitt stórt rokilsi, og tí hevði rektarin saman við næmingaráðnum kallað inn til fundar.

– Skúlin er kendur fyri sínar góðu veitslur, og vit hava havt ein góðan máta at gera hetta uppá. Men hetta var ikki støðan leygarkvøldið og tað álitisforhold, sum hevur verið millum næmingar og skúlan, hava nøkur brotið, staðfesti Mads Winther.

### Bæði gentur og dreingir

Mads Winther kundi somuleiðis staðfesta, at ongin veitsla verður aftur á skúlanum fyribils undir teimum treytum, sum annars hava verið.

Rektarin greiddi frá, at nú verður arbeitt við at plasera ábyrgdina. Hann hevur tosað við røttu viðkomandi, segði Mads Winther við Sosialin.

Á fundinum vísti Mads Winther á, at her var ikki talan um ein syndabukk, men um fleiri og at talan var um bæði um gentur og dreingir. Somuleiðis segði rektarin, at ongin næmingur fekk pengar endurgoldnar frá veitsluni, fyrr enn ábyrgdin var endaliga plaserað. Mads Winther segði, at í síðsta enda kann tað vera næmingaráðið, sum kemur at standa við endaligu rokningini fyri upptakingararbeiðið.

– Men hevur nakar tykkara hug at lætta um samvitsku tykkara, um tit hava nakra, so eru tit vælkomin á kontórið hjá mær og greiða frá, hvat tit hava gjørt og fáa eina rokning, staðfesti Mads Winther, rektari.

### Næmingaráðið fekk rós

Mads Winther greiddi næmingunum frá, at ongin verður vístur burtur frá skúlanum orsaka av hesum. Men hann vísti á, at hann hevur eina ávaringarskipan at ganga eftir, sum hann ætlar at brúka, og so verður talan um ávaring fyri atburð og ikki fráveru, sum annars er tað mest vanliga.

Mads Winther rósti annars næmingaráðnum og teirra máta at takla støðuna uppá.

– Næmingaráðið tók eina avgerð, sum ikki øll-um dámdi, tá tey avlýstu veitsluna. Men tað er ein avgerð, sum vit bakka fult upp. Ein púra røtt avgerð, og tey hava eisini síðani gjørt eitt stórt arbeiði.

Rektarin segði somuleiðis, at tey sum vóru ørg inn á næmingaráðið, heldur áttu at vent øðini móti teimum, sum oyðiløgdu veitsluna fyri hini.

– Vendi heldur tykkara aggressjónum móti teimum, sum uppførdu seg sum dýr, stóðu á borðunum, traðkaðu á matin og tveittu matin. Eg má spyrja, um tit uppføra tykkum soleiðis heima eisini og er tað støðan, so sigi eg bara Vorherre bevares!